*– Tað er ivasamt, um libanski búskapurin kemur fyri seg aftur*

*(libanskur bankanevndarformaður)*

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.kd
tlf 341800

ÚTLOND

# Libanski búskapurin fullkomiliga oyðilagdur



*Ísraelskir hermenn koma aftur til Ísraels í morgun eftir harðar bardagar við Hizbollah*

**Ísraelsku bumbu- og rakettálopini hava rakt Libanon so meint, at landsins búskapur kemur kanska ongantíð fyri seg aftur**

LIBANON
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Áhaldandi ísraelsk bumbu- og rakettálop í fjúrtan dagar hava oyðilagt so at siga allar brýr, 80 prosent av øllum høvuðsvegunum, havnir, floghavnir, telefonstøðir, sjónvarpsstøðir, skúlar og sjúkrahús í Libanon. Tað fer at kosta minst seks milliardir krónur at umvæla samferðslukerviđ, men nógvar aðrar útreiðslur koma afturat.

– Avleiðingarnar fyri búskapin verða sera, sera ógvusligar, sigur nevndarformaðurin í libanska BLC-bankanum, Shadi Karam, við BBC. Hann sigur, at álitið á libanska búskapin er bumbað í sor. Harafturat kemur, at útlendskir íleggjarar, útlendsk arbeiðsmegi, handilsfólk og ikki minst tey útlendsku ferðafólkini stungu í sekkin og flýddu av landinum, tá kríggið byrjaði, og at tað kann gerast torført at fáa tey at venda aftur.

– Tí er tað ivasamt, um búskapurin nakrantíð kemur fyri seg aftur, sigur Shadi Karam.

Libanski búskaparfrøðingurin Marwan Iskander sigur við BBC, at Libanon missir 3,6 milliardir krónur í inntøkum orsakað av kríggnum, men at tann búskaparligi missurin sum heild er umleið 12 milliardir krónur.

### Undirmett Hizbollah

Í Ísrael eru fólk farin at ótolnast eftir, at herurin ger av við Hizbollah, og fleiri halda, at átakið hevur tikið alt ov langa tíð. Summi vísa á, at í 1967 basti Ísrael herunum hjá Egyptalandi, Sýrialandi og Jordan eftir seks døgum. Nú eru meiri enn 14 dagar farnir, síðani Ísrael fór í hernað við Hizbollah, og so seint sum í gjár segði ein av teimum ovastu generalunum, at átakið kann taka ein mánað afturat.

Dagurin í gjár var eisini ein tann ringasti hjá ísraelska herinum nakrantíð, tá níggju ísraelskir hermenn lótu lív í bardøgum við Hizbollahmenn stutt norðan fyri markið. Nógvir aðrir vórðu særdir.

Í morgun vóru aftur harðir samanbrestir, og Hizbollah vísti, at rørslan er alt annað enn niðurbard, tí fleiri rakettir vórðu skotnar suður um markið uttan tó at gera stórvegis skaða.

### Aftur fundur

Í dag er fundur í Malaysia um viðurskiftini í Miðeystri. Tað er tann asiatiski felagsskapurin ASEAN, sum heldur fund, og millum luttakararnar er amerikanski uttanríkisráðharrin, Condoleezza Rice, ið kemur beinleiðis av fundinum í Rom í gjár.

Eygleiðarar í Kuala Lumpur vænta ikki, at Rice fer at fáa stuðul á fundinum í ASEAN, tí fleiri av limalondunum kunngjørdu aftan á fundin í Rom í gjár, at tey krevja vápnahvíld í Miðeystri beinanvegin.

Rættiliga óvæntað kunngjørdi iranska uttanríkisráðið í morgun, at landsins uttanríkisráðharri, Manouchelr Mottake, fer at taka lut á fundinum í Malaysia. Tað er tó óvist, um hann fer at tosa við sín amerikanska starvsbróður.

## STUTT SAGT

### Oljuævintýr fær avleiðingar

Tekur grønlandska heimastýrið ikki neyðug stig, kann eitt oljuævintýr í Vesturgrønlandi gerast ein marra fyri samfelagið. Tað sigur búskaparfrøðingurin Arne Rasmussen, sum starvast í Danske Bank.

– Er tað veruliga rætt, at nógv olja er undir vesturgrønlendska havbotninum, kann tað fáa sera óhepnar avleiðingar fyri grønlendska búskapin, sigur Arne Rasmussen við Politiken. Hann vísir á, at í øðrum londum, sum brádliga hava fingið ein stóran oljuídnað, hevur tað víst seg, at lønarlagið í oljuvinnuni fer upp ígjøgnum, og at lønirnar í øðrum vinnum megna ikki at fylgja við. Tað ger, at ein stórur paretur av arbeiðsmegini leitar sær í oljuvinnuna, og at tað almenna, sum eisini fær nógvar pengar burtur úr oljuni, fer við hinari arbeiðsmegini. Tað kann í ringasta føri hava við sær, at aðrar vinnugreinar noyðast at gevast, sigur hann.

Arne Rasmussen sigur, at hetta hendi í Niðurlondum í sjeytiárunum, tá nógv olja bleiv funnin í niðurlendska partinum av Norðsjónum.

Búskaparfrøðingurin í Danske Bank mælir grønlendska heimastýrinum til at stovna ein oljugrunn, soleiðis sum Noreg og Alaska hava gjørt. Á tann hátt ber til at forða fyri, at ov nógvir pengar frá oljuvinnuni koma út í samfelagið, og samstundis hava londini pengar at standa ímóti við tann dagin, eingin olja er eftir í undirgrundini.

### Kolera í Eystrasalti

Svensku heilsumyndugleikarnir ávara fólk ímóti at svimja í Eystrasalti, eftir at tveir menn í Blekinge hava fingið eitt sjáldsamt slag av sjúkuni kolera. Annar maðurin, sum er 80 ára gamal, bleiv so sjúkur, at hann mátti sendast í skundi á eitt sjúkrahús í Karlskrona. Kanningarnar vístu, at hann var smittaður av teirri sera sjáldsomu bakteriuni vibrio cholera, skrivar TT.

Rickard Eitrem, sum er serlækni í smittusjúkum, sigur seg ongantíð hava upplivað ein tílíkan smittutilburð øll tey 33 árini, hann hevur starvast í sjúkrahúsverkinum. Kolerabakterian smittar ikki ímillum fólk, men ígjøgnum sár á kroppinum. Kemur sárið í vatn, sum bakterian er í, kann hon koma í sárið, og so verður persónurin smittaður.

Rickard Eitrem sigur, at kolerabakterian kann vera lívshættislig, um hon kemur í blóðið, tí so fær viðkomandi blóðeitran. Men vandin er størstur hjá eldri fólk og fólki við avmarkaðum mótstøðuføri, sigur hann.

### Smuglaralið avdúkað

Í USA hevur løgreglan avdúkað eitt smuglaralið, sum tey seinastu árini hevur smuglað 25 tons av rúsevninum khat til USA.

Sambært løgregluni hava 44 fólk verið uppi í smuglingini, og 30 teirra sita nú í varðhaldi. Undir handtøkunum fann løgreglan fimm tons av khat, ið verða hildin at vera góðar 10 milliónir krónur verd á gøtuni í teimum amerikonsku stórbýunum.

Tað er bannað at innflyta khat til USA, men hetta rúsevnið er vanligt í londum sum Etiopia, Somalia, Kenya og Jemen.